# Atlantic missir milliónir

**Vánaliga veðrið og seinkingar geva Atlantic Airways størsta inntøkumissin í søgu felagsins í sambandi við afturvendingar og vánalig veðurlíkindi. Magni Arge hevur ongantíð upplivað nakað líknandi**

FLOGFERÐSLA

*Hans Kárason Mikkelsen*
*hans@sosialurin.fo*



*Tað merkist á rakstrinum hjá Atlantic Airways, at tað mangan ikki hevur verið lendandi í Vágunum seinnu mongu vikurnar. Flogfelagið hevur mist milliónaupphæddir. Magni Arge, stjóri, metir, at talan er um góðar tvær milliónir krónur upp á einar átta vikur. Yvirskotið hjá Atlantic Airways var í fjør 14 milliónir krónur, men høgi oljuprísurin og inntøkumissurin í sambandi við seinkingar og vánaligt veður ger raksturin nógv truplari enn í fjør. Magni Arge er tó við gott mót*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

Vánaliga veðrið í Føroyum í juni og juli mánaði hevur higartil kostað Atlantic Airways milliónaupphæddir í eykaútreiðslum. Flogførini fáa alt ov ofta ikki sett seg, og tað kostar føroyska flogfelagnum nógvar pengar.

Í dulnevndum lesarabrævi í Dimmalætting mikukvøldið verður funnist at tænastustøðinum og seinkingunum hjá Atlantic Airways.

Magni Arge, stjóri á Atlantic Airways, sigur, at hann sum so mong onnur ikki lesur dulnevnd lesarabrøv, men hann ásannar, at føroyska veðrið hevur gjørt tað trupult hjá Atlantic Airways hetta summarið.

- Veðurlíkindini hava verið sjáldsama vánalig í juni og juli mánaði, og tað hava verið nógvar afturvendingar. Hetta er ikki so lætt at hava við at gera. Vit ráða ikki yvir veðurlagnum, og í summum førum koma vit út í støður, har tað ikki ber til at fáa so góða tænastu, sigur Magni Arge, stjóri á Atlantic Airways.

Stjórin á føroyska flogfelagnum sigur, at mangan kemur flogfarið so mikið seint inn, at ymsar tænastur ikki eru til taks. Til dømis vísir Magni Arge á, at køkarnir eru stongdir, um flogfarið kemur seint inn.

- Tað snýr seg fyrst og fremst um trygdina og at fáa ferðafólkini fram. Tað er ógjørligt hjá okkum stýra øllum faktorunum, og um køkarnir eru stongdir, so er tað ikki líka lætt at veita eitt optimalt tænastustøði, sigur Magni Arge, sum leggur afturat, at arbeiðsfólkini umborð á flogførunum og kring flogførini gera sítt besta og arbeiða nógvar tímar í yvirtíð.

### Pengarnir fossa úr kassanum

Seinkingarnar og afturvendingarnar hjá Atlantic Airways hava økt nógv um útreiðslurnar hjá flogfelagnum.

- Eg havi ongantíð upplivað nakað líknandi. Her fossa pengarnir úr kassanum. Hesar seinastu 24 tímarnar hava vit til dømis mist eina kvarta millión, sigur Magni Arge, stjóri.

Magni Arge sigur, at sæð yvir juni og juli mánað hevur Atlantic Airways mist milliónir av krónum. Talan er til dømis um eyka útreiðslur til gisting og eyka arbeiðstíð. Magni Arge hevur ikki yvirlit yvir, júst hvussu nógvar pengar talan er um, men metingin er góðar tvær milliónir krónur.

- Støðan hevði verið nógv verri, um vit ikki høvdu fleiri flogfør at gera gott við. Í hesum døgum klára vit at innheinta seinkingarnar innan fyri 24 tímar. Í 1995 og '96 vóru vit ofta burtur í einar tveir til tríggjar dagar. So vit eru fegnir um, at vit hava fleiri flogfør at seta til, tá seinkingar koma fyri, sigur Magni Arge, stjóri.

# Uttanlandsskuldin hækkað eitt vet

**Uttanlandsskuldin hjá Føroyum var í fjør 6 milliardir krónur. Hetta er øking á 200 mió. krónur sammett við 2002**




*Ogn og skuld uttanlands 1994 til 2004.*

Í nýggjastu uppgerðini av uttanlandskuldini staðfestir Hagstova Føroya, at samanlagda skuldin hjá Føroyum í 2004 mótvegis umheiminum er 6 milliardir krónur. Hetta er ein hækking á 200 mió. krónur sammett við uttanlandsskuldina í 2002. Í 2003 var skuldin eins og í fjør 6 milliardir krónur.

Sambært uppgerðini er ogn føroyinga uttanlands minkað heili 1,2 milliardir krónur frá 10, 2 milliardum í 2002 til slakar 9 milliardir í 2004. Hetta hevur gjørt sítt til, at nettoognin uttanlands er komin niður á 3. milliardir krónur.

Hagstova Føroya vil vera við, at orsøkin til, at ognin er munandi minkað, er afturgongdin í føroyska búskapinum seinastu 3 ella 4 árini. Seinastu árini hevur hugurin at gera íløgur eisini verið stórur, og tí er lántøkan uttanlands økt munandi. Fyri at fíggja íløgurnar hevur verið neyðugt at brúkt av fíggjarognini uttanlands og at taka nýggj lán.

**.páll**